VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fleyr til gul av landsynningi ella av ymsum ættum og sirm ella mjørki í støðum, men eisini sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig, men har mjørki er, um 11 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fleyr til gul av útsynningi ella av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av vestri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið sunnudagin og mánadagin:
Fleyr til gul av útsynningi ella av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

Fyrsta felags framsýning

Á Listastevnuni hevur felagið Føroyskir Listgrafikarar sína fyrstu felags framsýning, sum letur upp mikudagin 8. august kl. 19.00 í Smiðjuni í Lítluvík. Allir luttakararnir vera hjástaddir

Mikudagin í komandi viku letur framsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Tað serliga við hesi framsýning er, at fimm listgrafikarar hava sína fyrstu felags framsýning. Listafólkini eru Karstin Olgar Lamhauge, Astri Luihn, Marius Olsen, Aase Bømler Olsen og Jóna Rasmussen.

Birgir Kruse letur framsýningina upp kl. 19.00. Framsýningin er forvitnislig, tí flestu grafisku arbeiðshættirnir innan fyri teir tríggjar høvuðsformarnar fyri grafikk eru umboðaðir – nevniliga háprent, djúpprent og flatprent - men kanska ikki nýtt á vanligan hátt.

Háprent er linoprent og træprent. Astri Luihn og Marius Olsen hava spesialiserað seg við hesum prenthættum, ofta tó saman við øðrum prenttøkni.

A skeivari klótu

Astri Luihn hevur hesaferð m.a. eina seriu við heitinum: »Eg man vera komin á eina skeiva klotu, her er so undarligt!«

Í hesum eksistensiella høpi letur hon fuglar, settar inn í eitt næstan surrealistisk landslag, umboða menniskjans spurningar í tilveruni.

Marius Olsen setir sum vant spurningar í sínum myndum bæði við myndina sjálva og leiklut hennara.

Karstin Olgar Lamhauge, Aase Bømler Olsen og Jóna Rasmussen arbeiða vanliga við djúpprenti, raderingum og etjingum og eisini meira modernaðum tøkni sum fotogravur.

Aase Bømler Olsen hevur í fleri ár roynd blandingsformum, har hon ofta tekur støði í eini radering og letur sjálvt skapið á prentplátuni vera tað kompositoriska snúningspunktið - ofta sett saman við motivum í ymsum prenthættum.

Fimm føroyskir listgrafikarar hava felags framsýning í sambandi við Listastevnu Føroya, sum byrjar í komandi viku

Religiøs motiv

Karstin Olgar Lamhauge brúkar ymisk sløg av metallgrafikki, har han roynir seg fram við tøkniligum og innihaldsligum problemum og spurningum. Ofta við religiøsum motivum.

Jóna Rasmussen hevur tey seinni árini serliga arbeitt við teimum møguleikunum, fotografiska tøknin kann geva grafisku listini við at flyta foto til eina grafiska plátu og síðani prenta tað.

Eyðkent fyri øll hesi fimm listafólkini er, at tey bert prenta myndir sínar í heilt fáum eintøkum. Serstakt er eisini, at tey gera prentini sjálv, so at listafólkið setir síni egnu fingramerki á arbeiðið í øllum liðnum í prosessini. Tey skula ikki hava hjálp frá prenthandverkarum, sum ofta er, tá listafólk venda sær til litografisk verkstøð.

Tað er umráðandi at hyggja eftir um »Egið prent«, »Tiré par l'artiste« ella samsvarandi er skrivað undir myndini. Tá hevur listafólkið sjálvt gjørt alt arbeiðið.

Framsýningin í Smiðjuni er opin hvønn dag frá kl. 14.00–18.00. Síðsti dagur framsýningin verður at síggja verður sunnudagin 19. august.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	9
Nuuk	5
Qaqortoq	6
Ammassalik	12
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	12
Lerwick	12
Aberdeen	15
London	24
Tromsø	10
Bergen	13
Oslo	–
Stokkhólm	21
Keypmannah.	17
Helsinki	16
Moskva	21
Berlin	22
Warzawa	24
Kiev	27
Bukarest	30
Paris	28
Madrid	35
Róm	31
Malorca	35
Athen	28
Malta	32
Tunis	34
Beijing	29
New Dehli	33
Bangkok	31
Jakarta	31
Sydney	18
New York	26
Miami	30
Los Angeles	22
Meksikobýur	–
Panama	29
La Paz	15
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	20

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 1013 hPa. vestan fyri Skotland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósnáttina.

Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og dýpist nakað.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 31/07 kl. 06⁰⁰– 01/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,1 mm – mált frá 31/07 kl. 06⁰⁰– 01/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 76,4 mm

VESTFALLSKYRRINDI

4. august: Fullmáni
5. august: Mánin longst frá jørðini
12. august: Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2001

Dagur	Suðuroyar-/ Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/ Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
2. aug.	06.14	18.38	05.14	17.38	05.29	17.53	08.14	20.38	09.14	21.38	04.29	16.53	03.29	15.53	06.29	18.53	07.29	19.53	05.59	18.23	07.14	19.38
3. aug.	07.02	19.25	06.02	18.25	06.17	18.40	09.02	21.25	10.02	22.25	05.17	17.40	04.17	16.40	07.17	19.40	08.17	20.40	06.47	19.10	08.02	20.25
4. aug.	07.48	20.11	06.48	19.11	07.03	19.26	09.48	22.11	10.48	23.11	06.03	18.26	05.03	17.26	08.03	20.26	09.03	21.26	07.33	19.56	08.48	21.11
5. aug	08.35	20.55	07.35	19.55	07.50	20.10	10.35	22.55	11.35	23.55	06.50	19.10	05.50	18.10	08.50	21.10	09.50	22.10	08.20	20.40	09.35	21.55

Sera bíligt at
LEIGA
SJÓNVARP
Úr 240,-
og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544